# Henrik Old takkar fyri seg



*Henrik Old takkaði fyri seg á uppstillingarfundi hjá Suðuroyar Syðra Javnaðarfelag*
*Mynd: Dagfinn Olsen*

**The Grand Old Man í Vági stillar ikki uppaftur til løgtingsvalið komandi. Hann hevur sitið á tingi síðani 1984**

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Henrik Old takkar nú fyri seg í politikki. Hesum boðaði hann frá á fyrsta uppstillingarfundi hjá Suðuroyar Syðra Javnaðarfelag.

Í november eru 23 ár síðani Henrik Old fyrstu ferð varð uppstillaður á listanum hjá Suðuroyar Syðra Javnaðarfelag, og varð hann valdur løgtingsmaður. Hann hevur sitið sum løgtingsmaður hesi árini síðani 1984. Við seinasta løgtingsval var hann tó ov stuttur - men kom á ting sum varamaður fyri Jóannes Eidesgaard, løgmann.

Henrik Old hoyrir sostatt til millum løgtingsmenninar við drúgvastu royndunum.

Á fyrsta uppstillingarfundi felagsins í gjárkvøldið boðaði Henrik Old frá, at hann metti tíðina vera komna, at onkur annar slapp framat.

Á fyrsta uppstillingarfundinum kom lítið ítøkiligt fram um, hvør verður á listanum, tá val verður útskrivað, men Mikkjal Sørensen varð nevndur. Hann hevur verið uppstillaður áður og hevur í fleiri umførum havt sæti á tingi.

MARKNAÐARRÁK

VIKA 36 2007

**PARTABRØVINI HÆKKA**

Evropisk partabrøv eru hesa farnu vikuna hækkað 2,8%. Sum nevnt í seinasta marknaðarráki var ein av mest týðandi hendingum í vikuni talan hjá amerikanska tjóðbankastjóranum Bernanke fríggjadagin. Hann endurtók at Fed vil taka neyðug stig fyri at tryggja at ótryggleikin, ið hevur valdað á fíggjarmarknaðurnum seinastu tíðina, ikki fær negativ árin á amerikanska búskapin. Hetta skal tó ikki skiljast sum at Fed er sinnað beinleiðis at hjálpa íleggjarum og lántakarum ið hava tikið skeivar avgerðir. Røðan hjá Bush forseta, har hesin lovaði at seta í verk eina verkætlan at fyri at bjarga húsaánarum ið vóru ringast fyri, stuðlaði eisini undir partabrøvunum fríggjadagin.

**HÆKKANDI HÁRENTUGJALDOYRU**

Fallandi váðastikni orsakað av størri tryggleika á fíggjarmarknaðunum hevur styrkt hárentugjaldoyru sum tukiska liran, meðan t.d tryggi sveisarafrankurin er lækkaður í kursi. Norska krónan, sum er nær tengd at oljuni, er sterk í løtuni, tí oljuprísurin er høgur nú ódini Felix nærkast landi og hóttir oljuframleiðsluna.

**RENTURNAR ÓBROYTTAR**

Lánsbrævamarknaðurin er sera lítið ávirkaður av fíggjarkreppuni. Renturnar eru framvegis óbroyttar í mun til fyri viku síðan og 10-ára rentan liggur á 4,36%.

**HESA VIKUNA**

Av týðandi hendingum hesa vikuna er rentufundurin hjá evropiska Miðbankanum. Hóast búskapurin og prísvøksturin í Evropa tala fyri eini rentuhækking, er meiri sannlíkt at miðbankin raðfestur ótryggleikan á fíggjarmarknaðunum hægri og tískil fer at hava rentuna óbroytta á 4%, inntil størri vissa valdar á marknaðunum. Eisini kann amerikanska arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin og ídnaðarlitið ISM fara at ávirka láns– og partabrøv. Partabrøv eru hækkaði væl aftur, og nærkast skjót einum stigi har keyp av partabrøvum aftur verður áhugavert. Vit mæla tó til at bíða nakað enn.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1427,61 | + 2,02% |
| Alheims partabrøv | 8542,80 | + 1,19% |
| Atlantic Petroleum | 1084,00 | -2,17% |
| Føroya Banki | 229,50 | -2,34% |
| Eik Banki | 692,00 | -0,14% |
| KB Trygg Eurostoxx | 109,51 | + 0,49% |
| USD | 546,74 | + 0,23% |
| JPY | 4,72 | + 0,17% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK